TILTØK

Gudstænastur
7. sunnudag e. trinitatis
Saksun: kl. 11,
Hvalvík: kl. 12, Marjun Bæk
Kollafjørður: kl. 11, Mogens T. Christensen
Selatrað: kl. 11, Jógvan Fríðriksson
Porkeri: kl. 12, JónsveinBech
Funningur: kl. 11 messa,
Gjógv: kl. 12.30 messa, Emil Olsen
Vestmanna: kl. 11, altarg., Inga Poulsen Dam
Gøta: kl. 11, Martin R. Jacobsen
Havnar kirkja: kl. 11, Hans J. Joensen, biskupur
Kaldbak: kl. 12, Jóannis Fonsdal
Hvannasund: kl. 12, altarg., Elsa Funding
Vesturkirkjan: kl. 11, kór luttekur, Heri Joensen
Søldarfjørður: kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
Húsavík: kl. 12, Jákup R. Hansen
Vágur: kl. 11 gudst., Patrick de Neergaard
Porkeri: kl. 12, Jónsvein Bech
Hvalba: kl. 12.30 Ólavur Rasmussen

Lívdin
í Hoyvíkar skúla
Onki møti verður sunnudagin. Byrjað verður aftur sunnudagin 15. august 2004.
www.livdin.fo

BRÚDLEYP

Týsdagin 27. juli kl. 15.00 giftast í Havnar kirkju Beinta Dimon Mohr, Tórshavn og Eyðfinnur Finnsson, Lamba. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum.

Týsdagin 27. juli kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni í Tórshavn, Heidi Reginsdóttir av Húsabrúgv, Argir, og Sjúrður Vatnsdal, Skopun. Veitsla verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum á Argjum. Tey, ið vilja heilsa upp á brúðarparið, kunnu støkka inn á gólvið í Reynstúni 24 á Argjum 28. juli eftir kappróðurin.

Leygardagin 31. juli kl. 15.00 giftast í Vestmanna kirkju Jóhanna Gunnlaugsdóttir, Vestmanna, og Anders Christiansen, Fredericia. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Vestmanna kl. 19.00.

Fríggjadagin 6. august kl. 15.00 giftast í Gøtu kirkju Katrin Sigurðsdóttir, Norðragøta og Karstin Kristiansen, Leirvík. Opið hús við nátturða og drekkamunni verður í Róðrarneystinum á Glyvrum kl. 20.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma verða biðin um at ringja á tlf. 443241 ella 441363 innan 30. juli.

Leygardagin 7. august kl. 14.00 giftast í Kollafjarðar kirkju, Sólvá í Homrum úr Kollafirði og Jógvan Egholm úr Vestmanna. Vælkomst verður í Ítróttarhøllini í Vestmanna kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, kunnu siga frá á tlf. 424242, 227016 ella 226677. Seinasta freist at siga frá er 25. juli.

Sunnudagin 15. aug. kl.10.00 giftast í Sørvágs kirkju, John Arnfinn Reynstind, Miðvági, og Andrea Jacobsen, Sørvági. Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Miðvági kl.12.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 1. aug. á tlf. 332847 ella 509151.

Leygardagin 11. september kl. 16.00 giftast í Porkeris Kirkju Joan Bech & Páll Vejhe, bæði úr Porkeri. Vælkomst verður í VB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 26. aug. á tlf. 373250, 373226 ella 373570.

Sunnudagin 15. august kl. 11.00 giftast í býráðssalinum í Havn, Randi Fjallsá, Tórshavn, og Andras Nolsøe, Trongisvágur. Vælkomst verður í Pálsstovu kl. 14.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 21. august kl. 14.30 giftast í Betesda í Klaksvík Elsebeth Heinesen og Jón Kári Frederiksen, Klaksvík. Veitslan verður á Hotel Norð kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu, kunnu boða frá á tlf. 455866, 215899 ella 229176 áðrenn 1. august.

SILVURBRÚDLEYP

Mikudagin 8. sept. hava Hallur og Ester Mohr verið gift í 25 ár. Vælkomst verður í bygdahúsinum Samljóð í Skopun leygardagin 28. august kl.19.00. Tey ið ynskja at gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu verða biðin um at siga frá á tlf. 361156, 361395 ella 444412 áðrenn 15. august. Í sambandi við veitsluna siglir Teistin av Skopun á Gomlurætt kl. 0200.

80 ÁR

Mánadagin 2. august verður Selma Kristiansen, Leirvík 80 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum sunnudagin 1. august kl. 14.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Tórsgøta 19
Sunnudagin kl. 17 Familjutími, skótarnir stíla fyri. Vitjan av skótum frá Englandi, drekkamunnur aftaná. Øll eru vælkomin.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Debbie Joensen, ongin sunnudagsskúli vegna summarfrí.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgunin kl. 7.00 Bøn.

Missiónshúsið við Landavegin
Sunnukvøldið kl. 18 Møti.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Benny Blumensaat presti, í Mariukirkjuni.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15.30 til 18. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. »Ver her og vak við mær, vak og bið«.

Frá Ebenezer
Leygardagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, sunnudagsskúlin í summarfrí, kl. 18 evangel. møti.
Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Á møtinum talar Benny Drewsen.
www.hebron.fo

Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Atla Rasmussen.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17: Landsbøn.
Í morgin kl. 11: Morgunmøti við Ólavi Jacobsen kl.18: Vitnimøti við Ásu Lützen.
Mánadagin kl. 20: Bønarskúli.
Um tær tørvar forbøn ring 214067
www.filadelfia.fo

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnukvøldið kl. 19.00: Møti. Tey ungu.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Einki møti vegna summarfrí.
Byrja aftur 15. august 2004.

Vestmanna missiónshús
Heimamissiónin hevur útimøti á Torginum í Vestmanna leygardagin kl. 20, aftaná verður drekka og sangløta í missiónshúsinum.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús v/ Anniku Høj.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Paula Høj.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Samkoman Lívsins Orð, Runavík
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti.
Mikudagin kl. 19.30 Bønarmøti og – um viðrar – útimøti aftaná.

Elim í Søldarfirði
Sunnudagin kl. 12 Breyðbróting, kl. 18 verður Vitnisburður við lokalum kreftum.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

KFUM & K, Klaksvík
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Petur Martin Glerfoss og kl. 21 Ungdómsmøti.

Getsemane, Klaksvík
Sunnumorgun kl. 11 Møti.
Týskvøldið kl. 20.30 Hugnaløta fyri ung.

Soli Deo Gloria
Sunnukvøldið kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betania, Skopun
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti.

Missiónshúsið í Skopun
Einki møti vegna stevnu í Húsavík.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnukvøldið kl. 18 Møti, Nimrod og Ebba tala og syngja. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 18 Evangel. fundur, kl. 21 Útifundur – um viðrar. Ónsdagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.

Frelsunarherurin, Vágur
Leygardagin kl. 20 Útimøti við Glasstovuna á Tvøroyri.
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti, Palli Petersen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sion, Vágur
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti.
Mánakvøld kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777.
Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

Samkoman Malta
Fríggjakvøldið 23. juli, leygarkvøldið 24. juli og sunnukvøldið 25. juli kl. 19.30 verða evangeliskir fundir í Cosmos Trawl Østhavnen, Hirtshals.
Har hoyra vit sjómenn, ferðandi og fastbúgvandi tala, sangkreftir úr Betesda, Klaksvík, luttaka við í sanginum.
Eftir fundirnar bjóða vit kaffi.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Samkoman Malta
Tlf. 98944370

Eldrafelagið Nón, Saltangará
Vit gera útferð í Vágar 22. august. Farið verður frá Sjómansheiminum í Runavík kl. 9.30. Tey, ið ynskja at verða við, biðjast tekna seg á telefon 447718 innan 16. august.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Tilhaldið verður stongt vegna umvæling frá:
28. juni til 28. juli og frá 30. juli - 13. august.
Ólavsøkuframsýning verður í Tilhaldinum 28.-29. juli.

Brúðarmyndir 1919-1971. brúðarkjólar, fjarrit.
Søla: Drekkamunnur og drýlur í kjallaranum.
Opið: kl. 15.00-19.00.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Frá ferðavinnuni í Suðuroy
Leygardagin 24. juli gongutúrur úr Fámjin til Hovs.
Bussur koyrir av Kunningarstovuni í Vági (gamli skúli) kl. 10.00 og av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 10.30. Staðkend heimildarfólk eru við á túrinum.
Eftir loknan gongutúr, verður koyrt við bussi úr Hovi til ávikavist Kunningarstovurnar á Tvøroyri og í Vági.
Bindandi tilmelding til túrin skal gerast á kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342/ 284342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480/284480 í seinasta lagi **fríggjadagin kl. 16.00.**
Sunnudagin 25. juli verður túrur við Johannu
Johanna fer av gomlu kaj á Tvøroyri kl. 13.00. Skipið setir kós móti Tjaldavíkini sunnan fyri Øravík. Í víkini leggur hon stilt. Thailendskur matur verður borðreiddur. Saft fæst aftur við. Tey sum vilja hava annað at drekka, verða biðin um at taka tað við sjálvi. Johanna verður aftur á gomlu kaj á Tvøroyri kl. 17.00 soleiðis at tey, sum ætlað sær norður við Smyrli kl. 17.30 kunnu tað.
Bindandi tilmelding til túrin skal gerast á kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342/ 284342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480/284480 **í seinasta lagi fríggjadagin kl. 16.00.**

Eysturoyar Gongufelag
Gongutúrur verður úr Syðradali upp um til Blankskála sunnudagin 25. juli. Farið verður við báti úr Leirvík kl. 9.00. Havið matpakka við. Túrurin er tungur. Tilmelding á Kunningarstovuni í Eysturoynni innan fríggjadagin 23. juli kl. 15. Avmarkað luttøka.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Tí hvat gagnar tað manni, um hann vinnur allan heimin, men má bøta aftur fyri við sál síni
Matt.16.26 a.

Ørindi er tikið úr øðrum prædikutekstinnum til ólavsøkudag.

So dýrabar er ein mannasál fyri Guði, at øll viði í heiminum viga ikki upp ímóti henni. Tað kemst av, at nakað er við sálini,ið varir ævigt, meðan alt, sum er í heiminum, skal fara til grundar. Uppreisnartankin er við í hesum orðum. Jesus roknar ikki bara við foldarlívinum, men eisini tí æviga lívinum. Hann veit, hvat tað er,ið hann vil kalla fram til nýtt lív á evsta degi, og hvat ið ongantíð skal livna upp aftur tá í undirgangsins og deyðans vald hevur tikið tað.

Lati okkum brúka okkara skil. Vit mugu ikki selja okkum sjálv til tað,ið fara skal til grundar. Sjálvt um vit gjørdust eigarar av tí øllum somlum, fingu vit bara gleði av tí eitt stutt bil. Einaferð rennur tað sum vatn út aftur millum fingrar okkara. Tí kunnu vit lættliga keypa gull ov dýrt. Skulu vit gjalda tað bara við tí minsta av ævinleikans virðum, verða vit lumpa.

Alt, sum til er í heiminum, er til fyri okkara skyld. Tað skal tæna okkum. Tað er ætla sum Guðs góðar til okkum meðan vit eru á foldum. Tí kunnu vit brúka av tí eftir tørvi. Men ætlanin er ikki, at vit skulu tæna tí og træla fyri tað og leggja lív okkara inn undir tað. Um sál okkara hvørvur í tí og verður jarðað í tí, vil allur okkara stuttleiki og kæti enda í gráti og gremjan. So hava vit við at brúka tað skeivt umskapað tað, ið kundi verið til nyttu og gagns, til nakað, ið spilti okkum sjálv. Guðsótti saman við nøgdsemi er stórur vinningur. Men ágirnd kann hava við sær øðiligt tap.

Amen!

John S. Myllhamar

TILTØK

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Vágs Pensionistafelag
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag.
Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

Føroya Heimavirkisfelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

NA (Anomymir narkomanar)
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Fyribyrgingarráðið
Argjaboðagøta 7 · 160 Argir
postrúm 135 · 110 Tórshavn
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostur.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Heilafelagið
Íslandsvegur 10 · tlf. 317373
T-post: heilaf@post.olivant.fo
Nærri upplýsingar, eisini við ráðgeving, finst á heimasíðuni: www.mbf.fo undir »Um MBF«.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

Javni
Hoydalsvegur 40 · 3 hædd
Skrivstovan er stongd, vegna summarfrí, frá 12. juli – 16. august.
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo
og t-post adressu:
javni@post.olivant.fo har tit altíð eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Felagið fyri lesi- og skriviveik
Postadr.: MBF-Húsið
Íslandsvegur 10c
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Opið er týs- og hósdag frá kl. 13.00-16.00.
Tlf. 310237. www.gikt.fo
T-postur: gikt@gikt.fo
Stongt er vegna summarfrí frá 8. juli til og við 17. august.

Deyvafelag Føroya
Íslandsvegur 10B
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597, fartlf. 222381, skrivitlf. 316929 · fax 313609 og teldupostadr. deaf@deaf.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Grønlandsvegur 58, Tórshavn
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

MBF – Meginfelag teirra brekaðu
Íslandsvegur 10c
FO-100 Tórshavn · tlf. 317373
MBF skrivstovan er soleiðis opin: Í viku 28, mánadag, mikudag og hósdag og í viku 29, týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 9-15.
Í viku 30, 31 og 32 verður skrivstovan stongd.

Alzheimerfelagið
Tórsbyrgi 16 · 100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo

Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Køliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Sinnisbati
Íslandsvegur 10 C, 100 Tórsh.
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16-18. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 314796, Hallbjørg

LISA -
Skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Pætursarstovu
Vegna summarferiu verður skrivstovan stongd í juli. Opið verður aftur sum vanligt mánadagin 2. august.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 15 til 18. LFÚ ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16 til 18.
Tinghúsvegur 18, 3. hædd, Tórshavn.
Tel. 310220 (skrivstovan)
tel. 315015 (ráðgevingin).
Teldupostur:
lfu@post.olivant.fo
Heimasíða: www.lfu.fo

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Samband við felagið fæst við at ringja tlf. 322686.
Umsóknarbleð til Heimavirkisleguna í Danmark í summar kunnu fáast við at venda sær til felagið.

BRÚKARASAMTAKIÐ
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 377782/ 211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn.

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn Tlf. 315624 og 315688, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo og maf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Listarligur ráðgevi: Birita Mohr. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo

Leygardag 24.07 kl. 20⁰⁰
Leygardag 24.07 kl. 23⁰⁰
Sunnudag 25.07 kl. 20⁰⁰
Sunnudag 25.07 kl. 23⁰⁰

Leygardag 24.07 kl. 23⁰⁰
Sunnudag 25.07 kl. 22⁰⁰

Leygardag 24.07 kl. 20⁰⁰
Sunnudag 25.07 kl. 19⁰⁰

BIO KIOSKIN
Heitt Pop-Corn - Coca Cola
- Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.
Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

P/F ALMA
Maskinverkstaður & Smiðja
CATERPILLAR
Entreprenørmaskinur við fígging

Á hjalla 15 · Boks 1338 · 110 Tórshavn · tel 31 58 90 · fax 31 04 68 · jan@alma.fo